**Skjal B1**

**Fra:** Heri Petersen
**Sendt:** 3. december 2018 16:24
**Til:** Rannvá Sólheim <rannvas@logting.fo>
**Cc:** Løgting <logting@logting.fo>; Eyðgunn Samuelsen <eydgunn.samuelsen@amr.fo>; Eyðun Mohr Hansen <eydun.mohr.hansen@amr.fo>; Marjun Magnussen <marjun.magnussen@amr.fo>
**Emne:** SV: Spurningur frá Trivnaðaðarnevndini til lm. nr. 14/2018

Góða Rannvá

**Spurningur 1**: Tað ber ikki til at siga, hvussu nógvar nýggjar familjur fara at fáa rætt til familjuískoyti, og tí ber heldur ikki til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar, um lógin um familjuískoyti verður broytt sbrt. løgtingsmáli nr. 14/2018. Tó kunnu vit upplýsa, at tær familjurnar, sum fingu útgjald í september 2018, í miðal høvdu fingið 10.452 kr. meira útgoldið um árið. Hetta svarar til eina meirútreiðslu á 2.884 tús. kr.

**Spurningur 2**: Í hjá knýtta skjalinum er eitt yvirlit yvir barnastuðul, sum verður veittur ávikavist støkum og pørum – bæði sbrt. galdandi lóggávu og sbrt. løgtingsmáli nr. 14/2018. Eisini inniheldur skjalið dømir um inntøku, veitingar og barnastuðul til familjur í ymsum støðum.

Í sambandi við ætlaðu broytingina í § 11 (um ogn) hevur Trivnaðarnevndin spurt eftir, um tað er ein trupulleiki, at familjur missa familjuískoyti, tá frítíðarlønin verður útgoldin, og familjurnar tí í eitt tíðarskeið hava meira innistandandi enn 30.000 kr. Til hetta er at siga, at tá ein familja søkir um familjuískoyti, so biður Almannaverkið um skjalprógv fyri innistandandi pr. 31. des. Almannaverkið fremur ikki leypandi eftirlit við innistandandi hjá móttakarum av familjuískoyti, so í praksis eru tað ikki familjur, sum missa familjuískoyti, tá frítíðarløn verður útgoldin 1. mai.

Vinaliga/Sincerely

Heri Petersen
*Fulltrúi/Head of Section*

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304000 • Direct +298 734042
**heri.petersen@amr.fo** • **www.amr.fo** • Skype: **amr.hep**